# Bridge 13. partur: Víðari um stuðul

Vit halda fram við evninum frá farnu viku; um hvussu ein stuðlar makkaranum, tá hann hevur opnað meldingarnar við 1 í onkrum lit. Havandi tann tekstin í huga, byrja vit við at hyggja eftir nøkrum dømum:

1. Tú hevur 6HP og doubleton í kleyvara (1SP), 7 stig í alt. Melda 2♣, sum vísir 6-9 stig.
2. Melda 1♥. Heldur vísa tín major, en stuðla minor.
3. Melda pass. Hóast doubleton og fimm trumfar, so kanst tú ikki fáa meir en fimm stig burtur úr hesum kortum.
4. 3♣, sum vísir 10-12. Tú hevur 11HP og 1SP, 12 í alt.
5. 2♣. Tú hevur 9 stig til samans, meldingin vísir 6-9.
6. 4♠, vísir 13-15. Tú hevur 10HP pluss 3SP.
7. 3♠. 10 - 12. Tú hevur 8HP pluss 3SP.
8. Tú hevur 6 stig til samans, tí 2♠.
9. 2♣. Tú ert ov sterk/ur til at melda 2♠, og har vantar ein trumf fyri at kunna leypa til 3♠.
10. 1♠ - 3♠, 4♠. Suður hevur 10 stig samanlagt, og eftir at stuðulin er givin, er hondin hjá norðuri verd 15 stig. Tá makkarin hevur lovað 10-12, so fer skiparin, suður eftir útganginum. Her meldaður við bert 19HP.
11. 1♥ - 3♥ pass! Suður hevur samanlagt 11, og norður kann telja 13, aftan á at vera stuðlaður, tað er ikki nóg mikið til útgang, tí pass. Minntist tú til, at norður skuldi opna við sínum lægsta fýraliti?
12. 1♠ - 4♠, 6♠. Suður hevur 14, og vísir við sínum lopi til útgang, at hann hevur 13 - 15 og lopið er eisini eitt lyfti um fýra trumfar við makkaranum. Norður kann telja 19 við stuðulsstigum, og sum skipari setur hann punktum við at lyfta kontraktina í lítluslemm, tí hann telur á leið 33 í alt.
13. 1♦ - 3♦, 3UT. Norður hevur javnbýtta hond, og tí er nógv betri at royna níggju stikk í grand enn 11 við rútara sum trumf.
14. 1♠ - 2♠, 3♠ - 4♠. Norður hevur bert 14HP, men tveir doubletonar og seks trumfar gera hondina verda 17 stig. Hetta opnar møguleikan á útgangi, tá makkarin lovar 6 - 9. Norður áeggjar við at melda 3♠, og suður meldar útgang við 9 stigum.

| 11. | | | | | N | S |
|---|---|---|---|---|---|---|
| N: | ♠ KD872 | ♥ 9 | ♦ EK107 | ♣ EB7 | 1♠ | 2♠ |
| S: | ♠ E654 | ♥ D763 | ♦ 95 | ♣ 982 | 4♠ | |

Norður hevur 17 HP og fimm spaðarar, og tí opnar hann við 1♠. Makkarin hevur fýra spaðarar, og sjey stig í alt við einum stuðulsstigi fyri doubleton í rútara. Tí kann hann stuðla makkaran til 2♠. Norður veit nú, at makkarin hevur spaðara við, og tí kann hann telja stuðulsstig og leggja tey afturat sínum 17HP. Singletonin í hjartara gevur trý stuðulsstig, so hondin hjá norðuri er verd 20 stig, og norður veit eisini, at makkarin hevur millum seks og níggju stig, sum eigur at vera nokk til útgang, tí meldar hann fýra spaðarar.

| 12. | | | | | N | S |
|---|---|---|---|---|---|---|
| N: | ♠ E10 | ♥ DB763 | ♦ K62 | ♣ D93 | 1♥ | 2♥ |
| S: | ♠ B93 | ♥ E942 | ♦ B83 | ♣ 1086 | | |

Norður hevur 13 stig í alt, 12 HP og eitt stuðulsstig fyri doubleton í spaðara. Makkarin stuðlar til 2♥, ið lovar 6-9 stig. Norður sær, at har manglar nógv í 26 stig, og tí er eingin meining í at halda fram við meldingarnar.

| 13. | | | | | N | S |
|---|---|---|---|---|---|---|
| N: | ♠ KD5 | ♥ KD987 | ♦ 9 | ♣ EB87 | 1♥ | 2♥ |
| S: | ♠ 987 | ♥ EB43 | ♦ D87 | ♣ 943 | 3♥ | |

Her hevur norður eina upplagda hon til at opna 1♥, fimmlit og 15 HP. Suður hevur sjey HP og fýra hjartarar við, og hetta vísir hann við at melda 2♥. Nú veksur hondin hjá opnara við trimum stigum, tí singletonin fær virði. 18 stig og makkarin lovar 6-9, so er útgangur í sjónmála. Tí meldar opnari 3♥, sum biður stuðlaran melda 4♥, um hann hevur maksimum, tað er 8-9 stig, og melda pass, um hann bert hevur 6-7.

Minnist til, at um norður ikki sá nakran møguleika á at kom í útgang, so hevði hann meldað pass til 2♥.

## Hvør er skipari?

Tá opnað verður 1 í onkrum liti, er eingin skipari fastlagdur. Tað er fyrst, tá ein av spælarunum hevur víst, nøkulunda nágreiniliga, hvat hann hevur, at makkarin verður skipari. Viðkomandi hevur upplýsingarnar sum skulu til, fyri at koma víðari.

## Spurningar

Makkari tí hevur opnað meldingarnar 1♣, hvat er títt svar, tá tú hevur hesi kort?

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | ♠ 42 | ♥ KB7 | ♦ D653 | ♣ 10974 |
| 2. | ♠ D7 | ♥ DB74 | ♦ 982 | ♣ EK92 |
| 3. | ♠ 1083 | ♥ K8 | ♦ 982 | ♣ 76532 |
| 4. | ♠ 86 | ♥ E109 | ♦ K873 | ♣ KB83 |
| 5. | ♠ E5 | ♥ K76 | ♦ 9832 | ♣ B943 |

Makkarin opnar 1♠, hvat gert tú við hesum kortum

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. | ♠ KD54 | ♥ EB74 | ♦ 6 | ♣ 9832 |
| 7. | ♠ D1092 | ♥ KB72 | ♦ D1064 | ♣ 10 |
| 8. | ♠ KD53 | ♥ 76 | ♦ 9843 | ♣ 932 |
| 9. | ♠ EB7 | ♥ 87 | ♦ 954 | ♣ EB1073 |

Norður og suður hava niðanfyristandandi kort. Hvussu skulu tey meldast? Norður er gevari og eigur tí fyrsta meld.

| | 10. | 11. | 12. | 13. |
|---|---|---|---|---|
| N ♠ | KB763 | DB76 | EK1094 | D107 |
| N ♥ | D105 | D1096 | EB7 | ED5 |
| N ♦ | ED87 | E9 | 5 | KB109 |
| N ♣ | 9 | K108 | KB98 | ED9 |
| S ♠ | E1082 | K3 | DB75 | K82 |
| S ♥ | 7 | KB83 | 8 | B7 |
| S ♦ | K1092 | K876 | ED98 | E843 |
| S ♣ | 8754 | 965 | D742 | K862 |

*Kelda: Villy Dam, Bridgevejen 1, føroyskað hevur Helgi Arnþórsson*